Umsett úr donskum. Í ivaspurningum verður víst til donsku upprunaútgávuna.

https://www.ft.dk/ripdf/samling/20241/redegoerelse/R3/20241_R3.pdf

---

Frágreiðing frá uttanríkisráðharranum (Lars Løkke Rasmussen) 11. oktober 2024

# Frágreiðing

# um

# Arktis frágreiðing

(Skrivlig frágreiðing)

## 1. INNLEIÐSLA

Endamálið við frágreiðingini er at upplýsa danska Fólkatingið um átøkini hjá danska kongaríkinum í Arktis við serligum denti á tær týdningarmestu hendingarnar og úrslitini í sambandi við altjóða arktiska samstarvið seinasta árið. Inntil til 2021 var frágreiðingin ein frágreiðing um Arktisku Ætlanina hjá Kongsríkinum 2011-2020. Enn er eingin nýggj felags Arktisk Strategi fyri Kongsríkið.

Eftir at ætlanin fyri uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkin hjá Grønlandi var liðug í februar 2024 (Nýggi arktiski politikkurin hjá Føroyum kom út á várið 2024), er arbeiðið farið í gongd dagføra arktispolitikkin hjá kongsríkinum við endamálinum at semjast um eina felags tilgongd, áðrenn kongsríkið tekur við formansskapinum í Arktiska Ráðnum í mai 2025.

Virksemið, sum snýr seg um sambandið millum Danmark og Grønland og Føroyar, verður viðgjørt í árligu frágreiðingini hjá stjórnini um ríkisfelagsskapin (R10/2024). Samstundis er hædd tikin fyri, at frágreiðingin hjá stjórnini um norðurlendskt samstarv (R4/2023) eisini snýr seg um evni, sum hava samband við samstarvið í Arktis.

### 1.1 Yvirskipaða menningin í Arktis

Russiska innrásin í Ukraina 24. februar 2022 broytti grundleggjandi fyritreytirnar fyri tí altjóða samstarvinum um Arktis. Beinanvegin eftir innrásina gjørdu tey sjey samsintu arktisku londini (øll limalondini í Arktiska Ráðnum undantikið Russland) av at steðga samstarvinum í Arktiska Ráðnum. Í mai 2023 varð formansskapurin í Arktiska Ráðnum fluttur úr Russlandi til Noregs. Í februar 2024 var semja um at taka upp aftur talgildar fundir í teimum seks tøkniligu arbeiðsbólkunum í Arktiska Ráðnum. Samstarvið á politiskum stigi og fysiska fundarvirksemið í arbeiðsbólkunum er framvegis ikki tikið upp aftur.

Tann spenta støðan í sambandi við Russland ávirkar eisini trygdardynamikkirnar í Arktis. Við finskum og svenskum NATO-limaskapi eru sjey av átta arktiskum londum limir í NATO. Sum ein avleiðing av krígnum í Ukraina er Rusland blivið veikari hernaðarliga, men hernaðarmegin hjá Russlandi í Arktis er í stóran mun óskadd enn. Støðan ger samanumtikið Russland til ein meira óútrokniligan aktør – eisini í Arktis. Harafturat er tað møguligt, at Russland og Kina fara at samstarva hernaðarliga í Arktis. Í apríl 2023 gjørdu tey bæði londini eina avtalu um styrkt samstarv innan bjargingartænastu í økinum.

Russland hevur víðkað um sína hernaðarligu megi í Arktis í langa tíð. Útbyggingin verður mett at vera verjukend, men inniheldur í alsamt størri mun eisini ting, sum kunnu nýtast í offensivum atgerðum. Samstundis er hernaðarvirksemið økt í Arktis frá Russlandi og vesturheiminum. Trygdarpolitiska klimaið í økinum verður hervið meira óstøðugt. Málið um lágspenning, og at stríð, sum hava sín uppruna aðrastaðni í heiminum, ikki fara fram í Arktis, eru tí framvegis undir trýsti, men hetta er enn hornasteinurin í arktis-politikkinum hjá kongsríkinum, umframt meginreglurnar í Ilulissat-yvirlýsingini um frið, samrøðu og samstarv innan galdandi altjóða spælireglur.

Í ljósinum av trygdarpolitisku menningini hevur NATO sett meira uppmerksemi á Arktis. Strategiska konseptið hjá NATO frá 2022 sigur, at evnini hjá Russlandi at órógva styrkingar- og veitingarkervi hjá okkara sameindu í "Det Høje Nord" og siglingarfrælsið tvørtur um Norðuratlantshavið eru ein strategisk avbjóðing fyri samgonguna.

Saman við okkara sameindu fyriheldur kongsríkið seg leypandi til nýggja dynamikkin og trygdina í økinum. Við verjuavtaluni 2024-2033 fer Danmark, í samstarvi við Grønland og Føroyar, at betra um eftirlitið og virksemið í Arktis og Norðuratlantshavi, eins og at stuðla uppgávunum hjá tættum sameindaríkjum og NATO í økinum. Samstundis er samstarvið millum Grønland, Føroyar og Danmark styrkt m.a. gjøgnum samstarvsnevndina fyri uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk.

Í fleiri ár hevur altjóða áhugin fyri Arktis verið vaksandi. Uttan mun til avleiðingarnar av krígnum í Ukraina, heldur áhugin fram og vísir, at hóast hesar avleiðingar, er stórur tørvur á altjóða samstarvi. Hitin í Arktis økist nú meira enn fýra ferðir skjótari enn globali miðalhitin. Økingar, sum longu eru sera eyðsýndar fyri vistskipanir og lívfrøðiligt margfeldi, og sum í størri mun ávirka arktisk samfeløg og upprunafólk við harvið stórum krøvum um tillaging. Seinastu árini eru viðurskifti sum skógareldar og smelting av permafrosti vorðin vanligari fyribrigdi. Samstundis gera veðurlagsbroytingar Arktis meira atkomiligt. Hetta skapar handilsligar møguleikar, eitt nú nýggjar siglingarleiðir og útdrátt av ráevni. Hesir nýggju møguleikarnir kunnu hava negativar avleiðingar, eitt nú í sambandi við arktiska umhvørvið, umframt øktum tørvi á sjóbjarging (Search and Rescue).

# 2. ALTJÓÐA SAMSTARV UM ARKTIS

## 2.1 Arktiska Ráðið

Russiska innrásin í Ukraina 24. februar 2022 gjørdi, at samstarvið í Arktiska Ráðnum steðgaði upp, tí tað var neyðugt at taka eina pausu. Síðan tá eru avmarkað stig tikin fyri at lata upp partar av verkætlanarsamstarvinum, har Russland ikki luttekur.

Tað eydnaðist at taka formansskapin í Arktiska Ráðnum frá Russlandi til Noregs á einum talgildum fundi í Arktiska Ráðnum 11. mai 2023, har átta lond og umboð fyri tey seks upprunafólkini luttóku. Undir norska formansskapinum er støða javnan tikin til møguleikarnar at víðka samstarvið í Arktiska Ráðnum fyri at tryggja lívføri hjá felagsskapinum. Í februar 2024 var semja um at taka upp aftur talgildar fundir í teimum seks tøkniligu arbeiðsbólkunum í Arktiska Ráðnum.

Síðan stovningina í 1996 hevur Arktiska Ráðið spælt ein týdningarmiklan leiklut sum høvuðskjakpallurin fyri tað altjóða samstarvið í Arktis. Hetta er ikki minst galdandi fyri fólkið í Arktis, harímillum felagsskapirnar hjá upprunafólkinum, sum m.a. eru við í verkætlanarsamstarvinum hjá Arktiska Ráðnum um mál, sum hava týdning fyri íbúgvarnar í Arktis. Harafturat tað viðurkenda arbeiðið við at kortleggja veðurlagsbroytingar og teirra ávirkan á Arktis (m.a. brúkt í frágreiðingum frá Intergovernmental Panel on Climate Change (IPCC)) og verksetingin av økisligu handlingsplanini um havburturkast, harímillum plast.

Kongsríkið tekur við formansskapinum í Arktiska Ráðnum aftaná Noreg í mai 2025.

## 2.2 Fyribyrging av óreguleraðum fiskiskapi í Norðuríshavinum

Saman við Kanada, ES, Íslandi, Japan, Kina, Noregi, Russlandi, Suðurkorea og USA hevur kongsríkið Danmark (við Føroyum og Grønlandi) gjørt eina altjóða bindandi avtalu, sum skal tryggja, at einki verður fiskað í altjóða økinum í Norðuríshavinum, fyrr enn har er nóg mikið vísindaligt grundarlag fyri burðardyggum fiskiskapi. Avtalan varð gjørd í oktober 2018 og kom í gildi 25. juni 2021. Sum partur av avtaluni hava partarnir byrjað eitt vísindaligt samstarv, eitt nú Joint Programme of Scientific Research and Monitoring (JPSRM). Hetta skal veita vísindaliga ráðgeving til partarnar í avtaluni, eitt nú við luttøku av upprunafólkum og við at lurta eftir vitan hjá upprunafólkunum og lokalum. Í minsta lagi skal ein fundur í COP (Conference of the Parties) verða hildin annað hvørt ár, men í verksetingini verða hesir fundirnir tó hildnir oftari. Suðurkorea var vertur fyri COP1 í november 2022, COP2 í juni 2023 og COP3 í juni 2024. Í juni 2025 er Noreg vertur fyri COP4. Harafturat hittast partarnir regluliga í arbeiðsbólkum.

## 2.3 ES

13. oktober 2021 góvu ES-kommissjónin og felags uttanríkistænastan hjá ES út eina felags fráboðan um raðfestingarnar í framtíðar Arktis-politikkinum hjá ES. Politikkurin hevur samband við verksetingina av Green Deal sáttmálanum hjá ES og útinningina av ES-reglugerðini um kritisk ráevni. Sum partur av tí síðstnevnda undirskrivaðu ES og Grønland í november 2023 eina avtalu um ein strategiskan felagsskap um virðisketur fyri burðardygg ráevni.

Eitt ítøkiligt úrslit av felags fráboðanini var eisini upplatingin av skrivstovuni hjá ES-kommissiónini í Nuuk í mars 2024. Upplatingin av skrivstovuni er ein partur í at styrkja samstarvið við ES. Skrivstovan skal stuðla núverandi samstarvi í sambandi við fíggjarstuðulin hjá ES innan útbúgving og grønan vøkstur og finna nýggjar samstarvsmøguleikar fyri Grønland.

Enn hevur einki orðaskifti um Arktis-politikkin hjá ES verið í Ráðnum, hóast Russland hevur gjørt innrás í Ukraina.

## 2.4 Arktiskt samstarv í Norðurlondum

Eins og undanfarin ár hevur arktiska samstarvsætlanin hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum "Eitt burðardygt Arktis" fyri 2022-2024 burðardygga menning sum høvuðsfokus. Í 2023 fevndi arktiska samstarvsætlanin um eina opna pulju á 7,5 milliónir krónur. Harafturat er ein (lukkað) pulja fyri politiskar raðfestingar á 2 milliónir krónur. Í opnu puljuni vórðu 22 verkætlanir stuðlaðar, sum snúðu seg um nógv ymisk øki so sum heilsu, infrastruktur, ferðavinnu, umhvørvi og veðurlag. Í øllum verkætlanunum hava lokalir stovnar ein stóran leiklut. Universitetið í Grønlandi Ilisimatusarfik hevur, í samstarvi við NAPA, ábyrgd av uppgávuni at umsita opna umsóknarumfarið undir arktisku samstarvsætlanini.

# 3. SERLIG ÁTAKSØKI

## 3.1 Uppgávurnar hjá Verjuni í Arktis

Kríggið í Ukraina hevur ikki broytt strategisku málini og hernaðarligu áhugamálini hjá Russlandi í Arktis. Økið er bara vorðið týdningarmeiri fyri Russland (UDSYN 2023), sum eisini setur nýggj krøv fyri uppgávurnar hjá Verjuni í Arktis og Norðuratlantshavi. Málið er enn, at økið verður verandi eitt lágspenningsøki. Í tøttum samstarvi við Føroyar og Grønland fer stjórnin við tí málinum at styrkja um “suverenitetshondhevingina” og eftirlitið í økinum.

### 3.1.1 Verjuavtalan og avtalan um arktiska kapacitetspak kan

28. juni 2023 var ein nýggj verjuavtala gjørd fyri tíðarskeiðið 2024-33. Eitt felags grundarlag er gjørt millum Danmark, Føroyar og Grønland fyri viðurskiftum viðvíkjandi Arktis og Norðuratlantshavinum í verjuavtaluni. Felags grundarlagið lýsir málið um at varðveita Arktis og Norðuratlantshavið sum eitt lágspenningsøki, har møgulig stríð verða loyst friðarliga, samstundis sum innrásin hjá Russlandi í Ukraina verður viðurkend sum eitt umskifti í verju- og trygdarpolitikki. Semja er um at leggja dent á at betra um eftirlit og “suverænitetshåndhævelse” í økinum, eins og at stuðla tættum sameindum og uppgávunum hjá NATO í Arktis og Norðuratlantshavi. Eisini er semja um at tosa meira um føroyska og grønlendska luttøku í viðkomandi altjóða verjupolitiskum forumum, umframt altjóða venjingar. Avgerð um serlig átøk og evni verða tiknar í fleiri partsavtalum. Danska stjórnin hevur og fer framhaldandi at taka landsstýrið og grønlendska landsstýrið Naalakkersuisut við í teir partar av samráðingunum, sum viðvíkja Arktis og Norðuratlantshavið. Tá íløgur skulu gerast í sambandi við uppgávurnar hjá Verjuni í og kring Føroyar og Grønland, er tað framvegis ein raðfesting, at íløgurnar koma føroysku og grønlendsku samfeløgunum til góðar. Hetta kann til dømis gerast gjøgnum tætt samstarv við myndugleikar, fyritøkur, ídnaðar- og granskingarstovnar, eins og gjøgnum dual use-uppsetingar og kapacitetir.

Í sambandi við arktiska kapacitetspakkan eru serligar avtalur við Føroyar og Grønland gjørdar um tey tingini, sum verða sett á stovn í báðum pørtum av kongsríkinum, harímillum ein lofteftirlitsradari í Føroyum og ein hernaðar- og tilbúgvingargrundútbúgving í Grønlandi. Fyrsti flokkurin í Arktisku Grundútbúgvingini byrjaði 6. mai 2024, og út frá stóra áhuganum verður væntað, at talið av næmingum verður hægri næsta ár. Útbúgvingin er sett á stovn í samstarvi við Naalakkersuisut og hevur sum endamál at geva næmingunum møguleika at byggja upp sterkar førleikar innan neyðtilbúgving. Útbúgvingin heldur til í Kangerlussuaq, har ein av hornasteinunum í útbúgvingini er samstarvið við grønlendsku myndugleikarnar, harímillum grønlendsku løgregluna og bjargingarliðið. Uppsetanin av einum lofteftirlitsradara í Føroyum hevur samband við uppsetanina av tveimum líknandi radarum í Danmark, og hetta fer fram í tøttum samstarvi við Føroyar.

Í sambandi við grønlendsk-danska samstarvið um upprudding eftir fyrrverandi amerikanskt hernaðarligt virksemi í Grønlandi, er restin av veitingini frá tíðarskeiðinum 2018-2023 flutt til 2024 og frameftir. Uppgávan varð eftirmett í 2023, og á hesum grundarlagi heldur samstarvið fram.

Í 2024 gjørdu danska Verjumálaráðið og grønlendska flogvallafelagið, vegna grønlendska sjálvstýrið, eina fyribils semju um treytir fyri nýtslu av flogvøllinum, eftir at nýggju sivilu atlantsflogvallirnir í Nuuk og Ilulissat høvdu latið upp. Fyribils avtalan er galdandi til endan av 2027 og verður væntandi avloyst av eini nýggjari avtalu, tá greiða er fingin á framtíðar virksemi hjá Verjuni í Kangerlussuaq og framtíðar sivilu nýtsluna av flogvøllinum.

Í 2024 hevur Verjumálaráðið raðfest tað, at tyrlutilbúgvingin í Grønlandi, sum Air Greenland stendur fyri, fær ein sensorpakka við FLIR (infrareyðum sensori) og NVG (náttarsjónarbrillum). Sensorarnir fara at betra um evnini hjá bjargingarliðnum at leita og bjarga í myrkri og í ringum veðri, bæði á landi og á vatni. Væntandi verður ein sáttmáli undirskrivaður við Air Greenland áðrenn endan av 2024. FLIR verður væntað at vera klárt at fara í gongd 12 mánaðir eftir sáttmálaundirskriving og NVG 24 mánaðir eftir.

### 3.1.2 Altjóða samstarv

Spenningurin millum stórveldini ávirkar trygdarpolitiska klimaið í Arktis og Norðuratlantshavi, sum í ljósinum av hernaðarligu útbyggingini hjá Russlandi og langtíðar áhugamálunum hjá Kina gerst meira óstøðug. Innrásin hjá Russlandi í Ukraina hevur havt stórar avleiðingar fyri møguleikarnar fyri altjóða samstarvi í økinum. Á politiska stiginum síggja fleiri arktiskir statir øktan tørv á samskipan og deilan av upplýsingum um arktisk mál á verjumálaráðstigi. Tað verður væntað, at politiska samskiftið í verjuøkinum fer at økjast komandi árini, og harvið eisini sambandið við landsstýrið og Naalakkersuisut.

Myndugleikarnir hjá verjumálaráðnum samstarva við myndugleikar frá hinum arktisku statunum ísv. Arktisk Ráðið og Arctic Coast Guard Forum (ACGF). Samstarvið í Arktiska Ráðnum fer fram í arbeiðsbólkinum Emergency Prevention Preparedness and Response (EPPR), sum setir politikk og vegleiðingar og deilir royndir viðvíkjandi menniskjagjørdum vanlukkum og náttúruvanlukkum á sjónum og á landi í Arktis – harímillum leiting og bjarging, dálking av havumhvørvinum (olja, evnafrøði og geisling), skógareldar, skriðulop og omanlop o.s.fr. Danska verjan luttekur ígjøgnum Arktisk Kommando í ACGF, sum er eitt óheft og óformelt operativt samstarv millum arktisku bjargingartænasturnar við denti á leiting, bjarging og havumhvørvi. Kongsríkið Danmark fer at yvirtaka formansskapin í ACGF fyri tíðarskeiðið 2025-2027. Arktiskir spurningar verða eisini umrøddir innan karmarnar av norðurlendska verjusamstarvinum (NORDEFCO) við Ísland, Finnland, Noreg og Svøríki. Kongsríkið Danmark hevur formansskapin í NORDEFCO í 2024 og helt í hesum sambandi ein verjumálaráðharrafund í Føroyum, har man saman við føroyska landsstýrismanninum fyri uttanríkis- og vinnumál og eitt umboð fyri Naalakkersuisut í Grønlandi tosaði um trygdarpolitisku støðuna í Arktis og Norðuratlantsøkinum. Við NATO-limaskapinum hjá Finnlandi og Svøríki verður verjusamstarvið um Arktis í NORDEFCO styrkt. Hetta við uppítøku av Føroyum og Grønlandi í viðurskiftir viðvíkjandi Arktis og Norðuratlantshavið. Verjuleiðarin hittist árliga við starvsfelagarnar frá arktisku NATO-londunum í sonevnda arktiska CHOD-formatinum (Arctic Chiefs of Defence). Seinasti fundurin var í september 2023. Fundirnir snúgva seg í løtuni um at deila kunning, hóast tað væntandi verður til eitt meira skipað forum innan samstarv.

Leiðarin fyri Arktisk Kommando hittist árliga við starvsfeløgum í Arctic Security Forces Roundtable (ASFR) kjakunum. Forumið fevndi upprunaliga um teir átta arktisku statirnar umframt observatørarnar í Bretlandi, Niðurlondini, Fraklandi og Týsklandi. Russland setti sína luttøku í steðg í 2014. Forumið deilir royndir og greiningar um virksemisumhvørvið í Arktis. Í 2024 hevur ASFR gjørt sítt "terms of reference" fyri at lýsa sín leiklut í sambandi við onnur arktisk forum, íroknað m.a. Arktis CHOD.

### 3.2 Veðurlag

Í 2023 gav IPCC út seinasta partin av sættu høvuðsfrágreiðingini, sum tekur saman um vísindini um fysisku veðurlagsbroytingarnar, avleidd árin og tillagingarmøguleikar, eins og útlát og "mitigatión". Frágreiðingin leggur m.a. dent á, at við vaksandi upphitingini av jarðarknøttinum økist vandin fyri, at sløg útdoyggja, og lívfrøðiliga margfeldi í arktisku vistskipanini verður hótt – hetta er serliga galdandi fyri sløg, sum liva á og nær við havísin. Grønlandski innlandsísurin fer framhaldandi at bráðna, hóast framtíðar upphitingin verður avmarkað í samsvar við Parísavtaluna. Burturbræðingin - og harvið hækkandi sjóvarmálin - økist í takt við øktu alheimsupphitingina. Við eini varandi alheimsupphiting á 2-3 °C verður grønlendski innlandsísurin væntaður at hvørva næstan fullkomiliga. Hóast tað fer at taka fleiri túsund ár, fer tað enn at ávirka hækkingina av sjóvarmálanum.

Í 2024 varð peningur settur av úr "forskningsreserven" og fíggjarlógini til National Centre for Climate Research (NCKF), grundfest í Danmarks Meteorologisk Institut (DMI). Arbeiðið hjá NCKF fevnir m.a. um granskingarverkætlanir um arktiskt veðurlagseftirlit við fylgisveinadátum, framskrivingum um veðurlagsbroytingar komandi áratíggju, og um hvussu upphitingin fer at ávirka havstreymar, íslag og ískápur í Arktis. Vitanaruppbyggingin er stuðlað av longu veðurfrøðiligu dáturøðunum hjá DMI, sum verða savnað ígjøgnum eygleiðingarnetverkið hjá DMI í Grønlandi. Veðurfrøðiligu eygleiðingardáturnar, veðurlagsdátur og forsagnardata frá veður- og havmodellum fyri Grønland eru givin út fyri at stuðla grønum orkuskifti, nýskapan og vøkstri í Grønlandi.

Veðurlagsdátur (tíðarrøðir) grundaðar á fylgisveinamátingar verða brúktar á DMI til langtíðar kanningar av árinunum av veðurlagsbroytingum í Arktis, kring Grønland og Føroyar. Menningin av nýggjum veðurlagsdátum av sjó- og havíshita í Arktis, eygleidd frá fylgisveinum, staðfesti, at upphitingin í Arktis síðan fyrst í 1980-árunum er umleið fýra ferðir størri enn alheims miðaltalið. Harafturat verðaupplýsingar frá fylgisveinum brúktir til at vísa, at veðurlagsmodell duga betur at lýsa hitan yvir havísinum í Arktis enn áður hildið í sættu høvuðsfrágreiðingini hjá IPCC.

Í 2024 varð peningur latin til Program for Monitoring of the Greenland Ice Sheet (PRO-MICE) og Greenland Climate Network (GC-Net), sum er grundfest í De Nationale Geologiske Undersøgelser for Grønland og Danmark (GEUS) í samstarvi við ASIAQ Greenland Survey. PROMICE fylgir við gongdini í bráðningini fram við kantinum á grønlandska innlandsísinum við at brúka mátistøðir á ísinum og fylgisveinaeygleiðingar. GC-Net er eitt netverk av mátistøðum á innara partinum av innlandsísinum, sum varð

sett á stovn fyri umleið 30 árum síðani sum partur av veðurlagsgranskingarætlanini NASA/National Science Foundation (NSF). Í samspæli millum GC-Net og PROMICE er møguligt at seta upp eina samlaða massajavnvág fyri innlandsísin í Grønlandi. Seinastu kanningarnar vísa, at innlandsísurin, við núverandi útláti av vakstrarhúsgassi, er so langt burtur frá javnvág, at hann fer at elva til eina í minsta lagi 27 cm hækkan av alheims sjóvarmálanum, áðrenn javnvágin er komin upp á pláss aftur.

### 3.2.1 Veðurlagssamstarvið í Arktiska Ráðnum

Í Arktiska Ráðnum er samstarv um eftirlit og meting av veðurlagsbroytingum savnað í arbeiðsbólkinum Arctic Monitoring Assessment Program (AMAP) í samstarvi við m.a. arbeiðsbólkin Conservation of Arctic Flora and Fauna (CAFF). Donsk og grønlendsk granskingarúrslit og granskarar veita stóran stuðul til tey vísindaliga grundaðu samstørvini í Arktiska Ráðnum.

### 3.2.2 Grønland og Parísavtalan

Tá Parísavtalan í 2016 kom í gildið í kongsríkinum, varð ein territorial yvirlýsing gjørd eftir umbøn frá grønlendsku stjórnini, sum merkti, at Grønland ikki var partur av avtaluni. Á COP26 í 2021 boðaði formaðurin í grønlendska landsstýrinum Múte Bourup Egede frá, at grønlendska stjórnin nú ynskti, at Grønland skuldi gerast partur av Parísavtaluni. Eitt uppskot um hetta var einmælt samtykt í Inatsisartut 14. november 2023.

Í fyrireikingunum til at Grønland gerst partur av Parísavtaluni hava Danmark og Grønland dagført eina felags samstarvsavtalu, sum hevur til endamáls at styrkja samstarvið um altjóða veðurlagssamráðingarnar og endurspegla tann nýggja veruleikan, har bæði Grønland og Danmark (og Føroyar) hava bundið seg til Parísavtaluna. 20. juni 2024 varð dagførda samstarvsavtalan undirskrivað av táverandi ráðharranum fyri menningarsamstarv og alheims veðurlagspolitikk, Dan Jørgensen, og grønlendska ráðharranum fyri landbúnað, sjálvbjargni, orku og umhvørvi, Kalistat Lund. Sama dag sendi Naalakkersuisut, við heimild frá Uttanríkismálaráðnum vegna kongaríkið, eini boð til aðalskrivaran í ST um at taka úr gildi territorialu yvirlýsingina fyri Grønland í Parísavtaluni.

## 3.3 Umhvørvis- og veðurlagsstuðul til Arktis (fyrrverandi DAN- CEA-skipan)

Umhvørvisstuðulin og veðurlagsstuðulin, sum verða umsitin av ávíkavist Miljøstyrelsen og Energistyrelsen, fíggja ein týðandi part av átøkunum innan umhvørvis, náttúru og veðurlagseftirlit í Arktis og hava serligt fokus á umstøðurnar í og kring Grønland og eru ein berandi partur í arktiska umhvørvis-, náttúru- og veðurlagsarbeiðinum hjá ríkinum.

Umhvørvisstuðul til Arktis stuðlar arbeiðnum hjá kongsríkinum undir arbeiðsbólkinum hjá Arktiska Ráðnum, AMAP, um broytingar og ávirkan á vistskipanina, harímillum alheimsdálking av lívrunnum dálkingum (persistent organic pollutants (POP)), tungmálmi, plasti, mikroplasti, radioaktiviteti, sot o.s.fr.. Eisini fer umhvørvisstuðulin til arbeiðið í CAFF arbeiðsbólkinum, harímillum Circumpolar Biodiversity Monitoring Programme (CBMP), umframt arbeiðið í arbeiðsbólkinum Protection of the Arctic Marine Environment (PA- ME). Í 2024 eru átøkini stuðlað við 35,1 milliónum krónum.

Í 2024 fór veðurlagsstuðul til Arktis m.a. til eina røð av langtíðar eftirlitsætlanir, sum varpa ljós á veðurlagsbroytingar og avleiðingarnar, við tilsamans 19,5 milliónum krónum. Úrslitini av arbeiðnum endurspeglast í vísindaligum tíðarritum, umframt veðurlagsarbeiðið hjá Arktiska Ráðnum, og frí atgongd er til dátuna frá eftirlitsætlanunum í dátugrunnum.

## 3.4 Umhvørvi og náttúra

Verndin av arktisku náttúruni má síggjast í samanhangi við siðbundnu gagnnýtingina av náttúrutilfeingi í Arktis, harímillum fiski og havsúgdjórum. Tað er eyðsýnt fyri Grønland og Føroyar, sum hava heimild at umsita egin náttúru- og umhvørvisviðurskifti, við atliti til tær skyldur, sum standast av altjóða sáttmálum og eru bindandi fyri kongsríkið.

### 3.4.1 Veðurlagssamstarvið í Arktiska Ráðnum

Gjøgnum arbeiðið í AMAP hevur kongsríkið latið vitan um alheimsdálking so sum POP, tungmetal, plast og mikroplast, radioaktivitet og sot. Tíðarrøðirnar og dáturnar eru við til at styrkja evnindareglugerðir sum t.d. Minamata-sáttmálan um minking av menniskjagjørdum kvikksilvuri og Stockholmssáttmálan um minking av POP-sambondum. Hetta er vitan, sum m.a. hjálpir til at skilja ávirkanina av evnum á vistskipanina í sjónum og heilsuávirkanina á serliga børn og kvinnur, sum eru við barn. Nýggj eftirlitsdata verða savnað í 2024 og fara at hjálpa til at skilja, hvussu effektivir sáttmálarnir eru.

Í strategiska steðginum í Arktiska Ráðnum hevur AMAP-arbeiðið hugsavnað seg um innsavning av dátum í kongsríkinum og útgávu av vísindaligum greinum. Hetta arbeiðið verður væntandi fylgt upp av komandi AMAP leikmannafrágreiðingum og politiskum tilmælum. Á sumri í 2023 var kongsríkið vertur fyri eina vísindaliga verkstovu um aktuellar týdningarmiklar vitanartørvir í Arktis, harímillum um útbreiðsluna av tí globalt dálkaða evnisbólkinum PHAS, humanari eksponering frá ørkymlandi evnum (Chemicals of Emerging Arctic Concern, CEAC) og útbreiðsluna av djórasjúkum við luttøku av vísindafólkum úr Arktis. Í samstarvi við Kanada fer kongsríkið at geva út vísindaligar greinar í 2024 um staðbundnar keldur í Arktis ímóti dálking frá alheims keldum. Eisini er kongsríkið við til eina vísindaliga frágreiðing um radioaktiva dálking í Arktis.

Sum partur av IMO arbeiðir kongsríkið fyri at minka um útlát av soti í Arktis, við atliti til fíggjarligu avleiðingarnar fyri grønlendska samfelagið og handilsáhuga- málini.

Arktiska eftirlitsætlanin- og leiðreglurnar fyri plast og mikroplast stuðla økisligu handlingsplanini hjá PAME um maritimt burturkast og eru eisini við í øðrum altjóða avtalum, harímillum einari nýggjari ST-avtalu um plast, sum væntandi verður liðug í endanum av 2024. Kongaríkið tekur eisini lut í eini nýggjari kanning um kortlegging av nýggjastu vitanini um negativu árinini av plasti og mikroplasti í arktiskum djórum, sum væntandi verður útgivin í 2024.

Samstarvið um eftirlit og vernd av havumhvørvinum er miðsavnað í PAME. Í 2023-2025 hevur kongsríkið formansskapin í PAME og raðfestir eina vistskipanargrundaða tilgongd við denti á larm undir vatni, innræsin sløg og vard havøki, eins og onnur effektiv verjutiltøk til øki (Other Effective Area-Based Conservation Measures). Fleiri av fokusøkjunum fevna um samstarv við CAFF.

Sum partur av arbeiðsætlanini hjá PAME verður vegleiðingin til at seta í verk eina vistskipanargrundaða tilgongd í umsitingini av arktiskum havvistskipanum endurskoðað. Hetta hevur verið stuðlað av eini røð av verkstovum og ráðstevnum gjøgnum árið.

### 3.4.2 Lívmargfeldissamstarvið í Arktiska Ráðnum

Lívmargfeldissamstarvið í Arktiska Ráðnum er savnað í arbeiðsbólkinum CAFF, har kongsríkið hevur formansskapin í 2023-2025. Undir formansskapinum í CAFE hevur kongsríkið trý raðfestingarøki.

Fyrsta økið er havið sum eitt tema í samstarvi við PAME, m.a. við fokus á nýggju globalu málini undir sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi og áðurnevndu samstarvsverkætlanirnar. Annað økið er vitanaruppbygging, harímillum at tryggja uppítøku av vitan hjá upprunafólkunum, umframt vitan um støðuna og rákini í arktisku náttúruni. Triðja økið snýr seg um uppítøku av upprunafólkum og ungum fólki. Í formansskapinnum hevur kongsríkið tikið ung fólk við sum luttakarar á viðkomandi fundum, og eftir ætlan verður luttikið í eini ungdómsráðstevnu, sum væntandi verður hildin í byrjanini av 2025.

Arbeiðið í CAFF stuðlar m.a. arbeiðnum hjá kongsríkinum í altjóða forumum fyri náttúrufriðing og raðfestir m.a. eina nýggja strategiska ætlan. Kongsríkið heldur fram at leiða CAFF Circumpolar Biodiversity Monitoring Programme (CBMP) saman við USA og hevur arbeitt við verksetingini av ætlanini fyri CBMP og arktiska lívmargfeldiseftirlitið fyri tíðarskeiðið 2021-2025.

Í 2023/24 hevur CBMP/CAFF fokuserað upp á tjóðskaparliga verkseting orsakað av strategiska steðginum í Arktis Ráðnum, umframt upptøkuna av fleiri verkætlanum, harímillum verkætlanir um lívfrøðiligt margfeldi í sjónum og á landi. Harafturat hevur eitt samstarv fokuserað upp á vísindaligar útgávur, m.a. um ávirkanina av veðurlagsbroytingum á lívfrøðiligt margfeldi og sonevndar "feedback" mekanismur (eitt samstarv millum AMAP og CAFF), umframt verið við í einari grein um 20 ára arbeiðið hjá CBMP, sum hevur gjørt mun til náttúruumsiting seinastu árini.

Í 2024 hevur kongsríkið framhaldandi leitt tvær verkætlanir í sambandi við samstarvið millum CAFF og PAME. Ein verkætlan snýr seg um innræsin sløg og fer at lýsa, hvørji innræsin sløg í sjónum eru skrásett í arktisku londunum, og gera eina váðameting fyri víðari útbreiðslu umvegis skip við ballastvatni og á skrokkum, harímillum eisini í sambandi við framtíðar veðurlagsbroytingar. Hin verkætlanin snýr seg um vard havøki og aðrar effektivar økisgrundaðar verndarfyriskipanir (OECMs). Á várið 2024 leiddi kongsríkið fyrireikingina av eini arktiskari altjóða verkstovu um OECM í Norðurlondum og í Arktis.

Harafturat luttekur kongsríkið í einari PAME-verkætlan, sum hevur til endamáls at kortleggja námsvirksemi (minedrift) í sjógvi og við strendurnar, harímillum burturbeining og útlát av burturkasti og námsfrárennsluvatni til havumhvørvið.

### 3.4.3 Vernd av umhvørvi og havumhvørvi

Út frá sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (Biodiversitetskonventionen) arbeiðir kongsríkið fyri at fremja, integrera og verja rættindi hjá upprunafólkum, og hetta skal gerast í samsvari við sjálvboðið, upplýst og undanfarandi samtykki frá upprunafólkunum í samsvari við UNDRIP (ST yvirlýsingin um rættindi hjá upprunafólkum).

Kongsríkið er eisini partur í OSPAR-havsáttmálanum (Convention for the Protection of the Marine Environment of the North-East Atlantic). OSPAR hevur sett ein arktiskan arbeiðsbólk (AOWG) á stovn at handfara arbeiðið hjá OSPAR við at verja arktiska partin av OSPAR-økinum. Umboð úr Grønlandi og Danmark fara at luttaka.

Kongsríkið hevur luttikið virkið í arbeiðnum hjá ST við einari løgfrøðiliga bindandi eykaavtalu til havrættarsáttmálan hjá ST um vernd og burðardygga nýtslu av lívfrøðiligum margfeldi í sjónum uttanfyri tjóðskaparligt lógøki (Biodiversity Beyond National Jurisdiction (BBNJ avtalan)). Avtalan varð samtykt av ST hin 19. juni 2023, og Danmark skrivaði undir avtaluna hin 20. september 2023. Danmark fer væntandi at seta avtaluna í gildi (við økisligum fyrivarni fyri Grønland og Føroyar) í sambandi við UN Ocean ráðstevnuna hjá ST, sum verður hildin 9.-13. juni 2025. Eftir hetta kunnu Grønland og Føroyar gerast partur av avtaluni.

Grønland og Danmark eru í gongd við at seta í verk eitt forboð frá sjóferðslufelagsskapinum hjá ST um nýtslu av tungolju sum skipsbrennievni í búskaparøkinum við Grønland. Í hesum sambandi hevur stjórnin fyrireikað eitt lógaruppskot og tvær kunngerðir, sum eru komin í gildi 1. juli 2024.

### 3.5 Verkætlanin um landgrunnin

Í tíðarskeiðinum 2009-2014 sendi kongsríkið skjøl (partvísar innsendingar) til ST kommissiónina fyri landgrunnamørk (CLCS) um víðkan av landgrunninum í fimm økjum. Tey fimm økini eru býtt í trý við Grønland og tvey við Føroyar, íroknað økið við Norðpólinum. Tey verða viðgjørd hvør sær av CLCS, sum aftaná viðgerðina gevur viðmæli. Um tað sambært tilmælunum frá CLCS framvegis eru yvirlappandi krøv fyri grannalondini, verður endaliga avmarkingin eitt evni í politiskum samráðingum millum hesi londini. Í tráð við Ilulissat yvirlýsingina leggur kongsríkið stóran dent á samrøðu og beinleiðis samráðingar millum viðkomandi tjóðir, bæði í sambandi við tøkniligar jarðfakligar spurningar og í sambandi við spurningar um avmarkingina av yvirlappandi sokkulkrøvum.

CLCS hevur fyribils givið eitt tilmæli um partssubmissiónini norðan fyri Føroyar. Í hesum økinum yvirlappaði landgrunnurin í kongsríkinum við landgrunnarnar úr ávíkavist Noregi og Íslandi. Eftir samráðingar undirskrivaðu partarnir í Stockholm hin 30. oktober 2019 avtalur um økið, og Fólkatingið gav samtykki smb. § 19 í grundlógini hin 25. mai 2021.

### 3.6 Markseting millum Grønland og Kanada

14. juni 2022 undirskrivaðu táverandi uttanríkisráðharrin Jeppe Kofod, landsstýrisformaðurin í Naalakkersuisut Múte B. Egede og kanadiski uttanríkisráðharrin Mélanie Joly eina avtalu, sum hevur við sær, at Tartupaluk (Hans Ø) skuldi deilast. Avtalan moderniserar eisini núverandi markasáttmálan frá 1973 og ásetir markið í Lincolnsjónum innanfyri 200 sjómíl. Harafturat er markið fyri landgrunnin sett út um 200 sjómíl í Labradorsjónum.

Avtalan kemur í gildi, tá partarnir hava boðað hvørjum øðrum skrivliga frá, at allar innanríkis mannagongdir eru framdar, harímillum neyðugar parlamentariska mannagongdir. Avtalan var einmælt samtykt av Inatsisartut tann

31. mai 2023 og varð liðugt viðgjørd í kanadiska parlamentinum í juni 2023. Fyri Danmark gav danska Fólkatingið samtykki sambært § 19, stk. 1, í grundlógini hin 19. desember 2023.

Endaliga staðfestingin bíðar eftir eini felags fatan um verksetingina av landamarkinum og møguligar broytingar á markareglugerðum.

## 3.7 Sigling og trygd á sjónum

### 3.7.1 Polarkotan og sigling í ísfyltum sjógvi

Polarkotan hjá IMO hevur til endamáls at styrkja trygdina í siglingini í arktiskum sjógvi og ásetur serlig krøv um útgerð og og konstruktión á skipum, umframt venjing av manning – hetta fyri at taka ímóti teimum serligu vandunum, sum eru knýttir at sigling í ísfyltum sjógvi. Polarkotan inniheldur eisini reglur um umhvørvisvernd av viðkvæmu náttúruni í Arktis.

Søfartsstyrelsen hevur arbeitt fyri at víðka partar av Polarkotuni til at fevna um skip sum fiskiskip, smá farmaskip (bruttotonsatal undir 500) og stuttleikafør, sum ikki verða brúkt handilsligt. IMO samtykti víðkanina av Polarkotuni á einum nevndarfundi í mai 2023, soleiðis at broytingarnar koma í gildi 1. januar 2026. Endamálið við víðkanini er at økja um sjótrygdina í arktiskum økjum við brúka partar av Polarkotuni meira.

Harafturat fokuserar Søfartsstyrelsen serliga á at fylgja Polarkotuni gjøgnum fyribyrgjandi eftirlit, serliga móti ferðamannaskipum, bæði áðrenn tey sigla í grønlendskum sjógvi, og tá tey eru til sýn í Grønlandi. Tað skal vera við til at betra um trygdina í sambandi við øktu siglingina hjá ferðamannaferðaskipum í ísfylta sjónum kring Grønland.

Í sambandi við arbeiðið í IMO tekur Danmark leypandi støður saman við bæði Grønlandi og Føroyum. Føroyar hava eisini atlimaskap í IMO og luttaka við egnum navni.

DMI rekur eina veðurtænastu í Grønlandi, sum ávarar um óveður og ger veðurforsøgnir og sjóvarforsøgnir fyri alt Grønland og havið rundan um. Sambært Chicago-sáttmálanum tænir veðurtænastan hjá DMI í Grønlandi sivilu flogferðsluna við ávaringum og forsøgnum. Síðan 2022 hevur DMI ávarað grønlendskar myndugleikar um ódnir, storm og svartakálk, og hevur í oktober 2023 ávarað borgarar í Grønlandi. Harafturat hevur DMI sett í verk eina royndarverkætlan um ávaring av skalvalopi, sum verður liðug í 2024. Bæði veðurforsøgnir, veðurkunning og ávaringar verða eisini veittar á grønlendskum. Sambært SOLAS-sáttmálanum (”International Convention for the Safety of Life at Sea”) verður skipaferðslan í grønlendskum farvatni úr Keypmannahavn skipað av ístænastuni hjá DMI. Bæði tann dagliga framleiðslan og menningin av nýggjum sløgum av ísupplýsingum verða framd í serliga tøttum samstarvi við ístænastur í USA, Kanada og Noregi eins og Copernicus Marine Services (partur av Earth Observation Programme hjá ES, sum bjóðar ókeypis upplýsingar um ís-umstøður o.s.fr.). DMI tænir eisini Arktisk Kommando við veðurfrøðiligum dátum og ráðgeving, harímillum upplýsingar um ís-støðuna fyri arktiska økið.

### 3.7.2 Føroyar

Frá 1. juni 2024 hevur Føroya landsstýri yvirtikið vita- og merkingarøkið og harvið tikið á seg strandalands skyldur í sambandi við siglingarhjálp. Eftir yvirtøkuna av málsøkinum hava føroysku myndugleikarnir ábyrgd av at tryggja, at altjóða reglur og reglugerðir viðvíkjandi "navigatiónsmarkering" verða hildnar.

Føroyar hava verið fevndar av limaskapinum hjá Danmark í altjóða felagsskapinum fyri vitar og merking (IALA) inntil 1. juni 2024. Føroyar hava síðani søkt um limaskap í IALA og eru blivnar limir.

## 3.8 Sjókort og kortlegging av havbotni

Álítandi sjókort eru avgerandi fyri sigling og siglingartrygd í Arktis. Danska Geodatastyrelsen (GST) umboðar kongsríkið í Den Internationale Hydrografiske Organisation (IHO) og teirra økiskommisjónum og arbeiðsbólkum. Arctic Regional Hydrographic Commission (ARHC) er arktiska økisnevndin, sum er samansett av londunum USA, Kanada, Noregi, Italia, Bretlandi, Finnlandi, Íslandi, Russlandi og Kongaríkið. Samstarvið við Russland er í løtuni steðgað. Høvuðsendamálið hjá kommisjónini er at tryggja samskipan millum vatnfrøðiligu skrivstovurnar í teimum einstøku londunum fyri at tryggja størst møguliga einsháttan viðvíkjandi sjókortum, havuppmáling og øðrum viðkomandi økjum, so sum verksetingin av nýggja alheimsstandardinum fyri sjódata og vørur (S-100) og verksetan av einsháttaðum dátuinfrastrukturi fyri sjóupplýsingar. Við góðkenningini frá IMO av S-100 standardinum, sum kemur í gildi í 2026, fara limirnir hjá ARHC komandi árini at leggja størri dent á verksetingina av hesum standardinum í arktiskum farvatni.

Eftir byrjanina av tøkniligum samstarvi í arbeiðsbólkunum hjá Arktiska Ráðnum, hevur ARHC økt sítt fokus á samstarvið við PAME og Arctic SDI við tí endamáli at stuðla menningini av tí talgilda landfrøðiliga dátuinfrakervinum og veita trúverdigar og neyvar marinar dátur til m.a. havumhvørvisvernd í Arktis.

## 3.9 Kortlegging og talgilt infrakervi fyri arktiskar landfrøðiligar dátur.

Danska Klimadatastyrelsen (KDS) samstarvar við kortleggingarmyndugleikarnar í hinum arktisku londunum undir Arctic SDI um talgilda infrakervið fyri landfrøðiligar dátur við denti á at fáa tær nationalu almennu arktisku dáturnar í spæl og stuðla við útbreiðslu og endurnýtslu av arktiskum dátum, sum m.a. eru bygdar upp í arbeiðsbólkunum hjá Arktiska Ráðnum. Steðgur hevur verið í formligu fundunum í Arctic SDI síðan mars 2022. Virksemið er í tráð við leiðreglurnar fyri samstarvið í Arktiska Ráðnum.

Danska Klimadatastyrelsen hevur ábyrgdina av rakstrinum av GNSS-netverkinum (Global Navigation Satellite System) í Grønlandi, eisini kent sum GNET. Í 2024 verður GNET víðkað til at fevna um tilsamans 71 permanentar mátistøðir. GNET er tað geodetiska infrakervið í Grønlandi, sum tryggjar geodetisku tilvísingina til álítandi geodátu, m.a. til nýtslu í effektivum veðurlagseftirliti av innlandsísinum og "suverænitetshåndhævelse".

### 3.10 Mineralsk ráevni

Útdráttur av mineralskum ráevnum umboðar ein handilsligan møguleika fyri Grønland, har vitan og dátur eru alneyðugt amboð í náms- og mineralídnaðinum. Í samstarvi við Naalakkersuisut hevur GEUS ábyrgdina av jarðfrøðiligum kortleggingum og geo-databasum í Grønlandi, sum hjálpir kanningarfyritøkum við granskingargrundaðari vitan um jarðfrøðina í Arktis og tilhoyrandi mineraltilfeingi. Klimadatastyrelsen hevur ábyrgdina av at útvega dagførda topografiska grundarlagið fyri jarðfrøðiligu kortini.

### 3.11 Gransking

Gransking er ein týðandi partur av grundarlagnum fyri arktiskum samstarvi og skapar grundarlagið fyri týðandi politiskar avgerðir um burðardygga menning og umhvørvi í Arktis. Granskingarøkið í Grønlandi er eitt yvirtikið málsøki og er harvið eitt grønlendskt mál. Yvirtøkan av økinum fór fram, eftir at kommisiónin KVUG varð niðurløgd í 2012, og nakrar uppgávur vórðu fluttar til grønlendska granskingarráðið NIS, sum hevur verið til síðan 1. juni 2014.

Í 2017 undirskrivaðu tey átta arktisku londini (og Grønland og Føroyar) eina løgfrøðiliga bindandi avtalu um styrkt granskingarsamstarv í og um Arktis. Avtalan skal elva til samstarv og fríari teymar fyri granskarar, granskingarútgerð o.s.fr. tvørtur um arktiska økið. Av tí at avtalan fevnir um Russland, hevur steðgur verið í samstarvinum síðan mars 2022.

Í 2022 varð nationala granskingarætlanin hjá Grønlandi 2022-2030 (”Forskning – Vejen til fremdrift”) útgivin, við denti á m.a. burðardygga samfelagsmenning og størri orientering ímóti grønlendskum áhugamálum í útlendskari gransking. Um várið 2024 góvu Føroyar út eina dagførda útgávu av skjalinum "Føroyar í Arktis", sum m.a. snýr seg um týdningin av gransking og vísindi fyri Arktis.

#### 3.11.1 Altjóða arktiskur miðdepil og ISAAFIIK

Síðani 2019 hevur altjóða arktiski miðdepilin (Den Internationale Arktiske Hub) verið fíggjað av bæði Danmark (umleið 3,0 milliónir DKK um árið) og Grønlandi (0,75 milliónir DKK um árið) gjøgnum árligu fíggjarlógirnar. Í 2024 fíggjaði Danmark 3,3 milliónir krónur til miðdepilin. Miðdepilin er ein samskipandi pallur í Grønlandi fyri grønlendskar, danskar og altjóða polargranskarar eins og arktiskar áhuga-partar.

Samskipan av granskingar- og granskingarlogistikki í Arktis verður gjørt gjøgnum portalin ISAAFIIK.org ("Gateway to the Arctic") fyri granskarar, stovnar og umboðsfólk – nationalt og altjóða. Síðan 2023 er stýrisbólkurin vaksin við umboðum frá altjóða stovnum við eini stórari skjalamappu (portefølju) innan gransking í Grønlandi.

Danskir og grønlendskar stovnar, sum reka arktisk granskingarskipanir (AU, DMI, DTU, GINR) eru partur av samskipanini á ES-stigi gjøgnum POLA-RIN (eu-polarin.eu, 2024-2029).

### 3.11.2 Forum fyri Arktiska Gransking

Síðani 2014 hevur Forum fyri Arktiska Gransking (FAF) virkað sum eitt týðandi organ fyri arktiskt granskingarsamstarv við luttøku av umboðum frá øllum teimum stóru granskingarstovnunum í Grønlandi, Føroyum og Danmark. FAF er við til at skapa góð samstarvssambond millum aktørarnar í arktiskari gransking í Grønlandi, Føroyum og Danmark.

### 3.11.3 Danska, grønlendska og føroyska nevndin fyri "Tíggjuár fyri havið" hjá ST

ST hevur halgað hetta tíggjuáraskeiðið 2021-2030 til at hava serligt fokus á heimsins havøki. Gransking og samstarv skulu stuðla til burðardygga sosiala samfelagsmenning og stuðla heimsmáli nr. 14 hjá ST um at varðveita og tryggja burðardygga nýtslu av havinum og tilfeingi tess. Danska, grønlendska og føroyska nevndin er sett á stovn eftir áheitan frá millumtjóðanevndini (UNESCO-IOC), sum við ST-mandati fyrireikar og samskipar Tíggjuár hjá ST altjóða.

### 3.11.4 UArctic

Arktiska universitetið (UArctic) er eitt netverk av universitetum, granskingarstovnum o.s.fr. í Arktis, sum var fíggjað við 3,0 milliónum krónum á fíggjarlógini fyri 2024.

### 3.11.5 Evropeiskt samstarv um arktiska gransking

ES verkætlanin EU-PolarNet2, fíggjað av granskingar- og íverkstanarætlanini Horizon 2020 hjá ES, er heimsins størsta samtak fyri arktiska serfrøði og infrakervi. Verkætlanin er í gongd inntil desember 2024. Horizon Europe, sum er í gongd frá 2021 til 2027, inniheldur fleiri fíggjarmøguleikar til ymisk viðurskifti av arktiskari gransking.

### 3.11.6 Felagsskapurin "Kongeriget Danmarks Partnerskab for Rum i Arktis"

Útbúgvingar- og Granskingarmálaráðið hevur tikið stig til at stovna ein felagsskap fyri rúmdina í Arktis, sum liður í stovnanini av fleiri nationalum rúmdarfelagsskapum. Við stovnanini av felagsskapinum í desember 2020 var felagsskapurin samansettur av 26 partnarum býtt í grønlendskar, føroyskar og danskar partnarar.

### 3.11.7 Nýtt granskingarskip

Tilsamans 189,4 milliónir krónur eru settar til síðis í fíggjarlógini fyri tíðarskeiðið 2021-2023 (2024-PL) og 65 milliónir krónur aftrat (2024-PL) við avtaluni um útbýtingina av granskingarreservinum o.s.frv. fyri 2024 um partvísa fígging av einum nýggjum tvørfakligum hav- og arktiskum rannsóknarskipi, DANA V. Samlaðu útreiðslurnar verða væntandi 477,3 milliónir DKK. A.P. Møller Fonden og Orient's Fond hava tilsamans latið 98 milliónir krónur til skipið. DTU hevur ábyrgd av útbjóðingini og byggingini av nýggja rannsóknarskipinum, sum væntast at verða klárt í 2027.

### 3.11.8 Styrkt arktisk gransking

Við avtaluni um útbýtingina av granskingarreservinum v.m. í 2024 vórðu 45,3 milliónir krónur settar av til at styrkja arktisku granskingina ígjøgnum eina arktiska granskingarætlan. Peningurin verður umsitin av Danmarks Frie Forskningsfond undir heitinum ʾArktisk forskning – Klimaforandringer og bæredygtige arktiske samfundʾ. Danmark tekur eisini lut í eini felags Nordforsk verkætlan upp á 190 milliónir norskar krónur, har peningurin verður latin í 2024. Fokus er á tvørfakliga arktiska gransking og er fíggjað av einum felags samtaki av norðurlendskum, amerikanskum og kanadiskum peningi.

Granskingarætlanin um havgransking í Norðuratlantshavinum (2020-2023) verður sett í verk av Granskingarráðnum í Føroyum. Ætlanin (2020-2027) er fíggjað við tilsamans umleið 58 milliónum krónum. Av tí varð tað forlongt við 7,9 milliónum krónum í 2026 og 7,9 milliónum krónum í 2027 ígjøgnum pening frá Norðuratlantspuljuni

### 3.11.9 Gransking um uttanríkis-, verju- og trygdarpolitikk

Í árunum 2023-2027 eru 16 milliónir krónur settar av til granskingarverkætlanir hjá grønlendskum, føroyskum og donskum granskingarstovnum við tí endamáli at styrkja samstarvið um uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk. Peningurin verður latin av Granskingarráðnum í Føroyum og er fíggjaður av Norðuratlantspuljuni.